# Føroya Felag móti Krabbameini havt aðalfund

Felagið hevði ársaðalfund týsdagin 23. apríl 2002, har m. a. val av nevnd var á skránni.

Í nevndini sita nú: Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen, Agnar á Dul, Gisela Djurhuus og Eliesar Olsen.

Tiltakslimir eru: Jónvør Christiansen og Davina Lamhauge.

Nevndin hevur skipað seg:
Jákup N. Olsen, formaður
Helena Dahl Olsen, næstformaður
Agnar á Dul, kassameistari

Í nevndini fyri Hjálpargrunnin sita: Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen og Eliesar Olsen.

# Alment Dansiskeið á Glyvrum

**Tíðindaskriv**

Eysturingar fáa aftur nú høvi til at læra at dansa eingilskan dans.

Møguleiki verður at læra teir vælkendu dansirnar so sum Foxtrot, Quick-step, Rock´n-Roll, vals og eisini verður undirvíst í linjudansi.

Vælkenda dansilærarinnan, Anna Kirstin, ið er av Tvøroyri, hevur skeiðið.

Nes Sóknar Musikkfelag skipar fyri dansiskeiðnum, sum verður í fimleikahøllini í Glyvra Skúla komandi fríggja- og leygardag, 10. - 11. mai 2002.

Øll dansiáhugað eru vælkomin, bæði byrjarar og vand, børn og ung, pør og støk.


Tøkk



Hjartans tøkk til tykkum mongu, sum stóðu saman um- og valdu Sambandsflokkin á løgtingsvalinum

Ein serlig tøkk fyri tann persónliga stuðul tit veittu mær

Somuleiðis ein hjartans tøkk til tykkum mongu, sum tóku lut í arbeiðinum, ið gjørdi valið til eitt sigursval fyri Sambandsflokkin

Edmund Joensen



RÆTTING

FERÐAÆTLAN - SUMMARIÐ 2002

Tyrlutænastan

| SUNNUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 12.00 |
| Gásadal | 12.06 |
| Mykines | 12.12 |
| Vágar | 12.23 |
| Vágar | 13.00 |
| Koltur | 13.07 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Skúvoy | 13.37 |
| Tórshavn | 13.52 |
| Klaksvík | 14.04 |
| Klaksvík | 14.35 |
| Svínoy | 14.47 |
| Kirkja | 14.51 |
| Hattarvík | 14.54 |
| Klaksvík | 15.12 |
| Tórshavn | 15.24 |
| Koltur | 15.29 |
| Vágar | 15.36 |

| MIKUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| Froðba | 12.35 |
| Dímun | 12.44 |
| Skúvoy | 12.49 |
| Tórshavn | 13.04 |
| Klaksvík | 13.16 |
| Svínoy | 13.28 |
| Kirkja | 13.32 |
| Hattarvík | 13.35 |
| Klaksvík | 13.53 |
| Klaksvík | 14.40 |
| Tórshavn | 14.52 |
| Koltur | 14.57 |
| Vágar | 15.04 |

| FRÍGGJADAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Klaksvík | 11.34 |
| Svínoy | 11.46 |
| Kirkja | 11.50 |
| Hattarvík | 11.53 |
| Klaksvík | 12.11 |
| Klaksvík | 13.00 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Froðba | 13.41 |
| Froðba | 14.15 |
| Dímun | 14.24 |
| Skúvoy | 14.29 |
| Tórshavn | 14.44 |
| Koltur | 14.49 |
| Vágar | 14.56 |
| Vágar | 15.30 |
| Gásadal | 15.36 |
| Mykines | 15.42 |
| Vágar | 15.53 |



| Prísir | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

Galdandi frá 1. mai til 1. oktober

**BÍLEGGING**
Tel 34 10 10
Fax 34 10 01
**Mán. - Frí.**
Kl 08.00 - 16.00
**Sun.**
Kl. 12.00 - 16.00

**BØRN**
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

**VIÐFØRI**
Í mest lagi 20 kg.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo



Tøkk



Javnaðarflokkurin takkar teimum mongu, sum stuðlaðu flokkinum á løgtingsvalinum

Flokkurin takkar somuleiðis øllum teimum, sum á ymsan hátt vóru við í sjálvum valstríðnum.

Eisini ein serlig tøkk fyri persónliga stuðulin, tit veittu mær.

Jóannes Eidesgaard
floksformaður




# Støðan fastlæst

**Andstøðuflokkarnir ynskja eina formansrundu, men Anfinn Kallsberg er ikki til reiðar at geva skarvin yvir. Tískil heldur hann fram í royndunum at skipa samgongu, men andstøðan stendur sum ein maður**

POLITIKKUR
*Heri á Røgvi*



*Jóannes Eidesgaard og Anfinn Kallsberg komu út at hitta fjølmiðlarnar eftir fundin millum Jóannes Eidesgaard og samgonguna. Støðan er fastlæst sum er, og lítið bendur á, at løgmaður hevur hug at royna eina heimastýrissamgongu.*
*Mynd: Finnur Justinussen.*

Kl. 10 mánamorgunin fór formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, á fund við sitandi samgongu. Hetta skuldi eftir ætlan vera byrjanin til realitetssamráðingarnar millum sitandi samgongu, t.e. Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

– Eg fór á fund, tí eg hevði fingið fundarboð, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann hevði longu frammanundan greitt frá, at hann hevði einki ynski um at vera til »at lappa saman« sitandi samgongu. Undan fundinum hevði hann gjørt avtalu við hinar báðar andstøðuflokkarnar, Sambandsflokkin og Miðflokkin, at hesir flokkar stóðu sum ein maður til samráðingarnar.

Tá hesir flokkara eiga 16 tingmenn, so merkir tað, at hvørgin parturin eigur meirilutan og tað stendur púrasta á jøvnum.

## Tingformansrundu

Eftir tann rímiliga stutta fundin við sitandi samgongu segði Jóannes Eidesgaard, at andstøðan ynskti eina tingformansrundu. Tað skal so vera hendan rundan, ið skal gera av, hvør skal royna at skipa eina samgongu. Hann gjørdi greitt, at avtalan millum andstøðuflokkarnar var galdandi til eina tingformansrundu.

Anfinn Kallsberg ætlar tó ikki at gevast í royndunum at skipa samgongu júst enn.

– Ein tingformansrunda kann lætt seta okkum í somu støðu, sum vit eru í. Eg havi tað mandatið, ið skal til fyri at skipa eina samgongu, og hetta ætli eg eisini at royna. Í skrivandi stund var eingin avgerð tikin um, hvørji leið, ið løgmaður ynskti at royna.

Løgmaður skifti eitt sindur runt við at tosa um samgonguna saman og flokkarnar sær. Hann hevur tó roynt eftir einum breiðum grundarlag við sitandi samgongu, men hetta sær tó ikki út til at fara at eydnast.

## Virða fólkið

Eftir fundin við løgmann og samgonguna segði gjørdi Jóannes Eidesgaard greitt, at andstøðan stóð sum ein maður til eina løgtingsformansrundu, ið er teirra ynski, sum støðan er nú.

– Vit mugu virða fólkið. Vit hava havt eitt løgtingsval í Føroyum, og hetta mugu vit virða. Løgmaður ger m.a., at vit ikki hava møguleika fyri einari heimastýrissamgongu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Í skrivandi stund visti løgmaður ikki, hvørji leið, hann vildi taka, men hann heldur seg ikki aftur við at royna.

– Avtalan við Sjálvstýrisflokkin stendur við, sigur Anfinn Kallsberg.

– Hetta er alt partur av politisku telvingini, sigur Anfinn Kallsberg.

Jóannes Eidesgaard úttalaði seg vegna andstøðuna fleiri ferðir. Hann segði tó, at andstøðan onga støðu hevði tikið, hvønn teir vildu peika á í einari møguligari tingformansrundu.

Bólturin liggur nú hjá Anfinn Kallsberg, og vit kunnu bert bíða eftir, hvat hann fer at gera.


Tøkk



Hjartans tøkk til øll tykkum, sum dyggiliga stóðu saman um Sambandsflokkin til løgtingsvalið

Ein serlig tøkk fyri allan persónligan stuðul

Bestu heilsanir
Johan Dahl





GSM FRÍTÍÐ
FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum